átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*




**"Men Harrin segði við meg: Rætt hevur tú sæð; tí at eg vil vaka yvir orði mínum til tess at evna tað" (Jeremia 1, 12)**

Stríðist tú við ein vana, sum er so treiskur, at hann nærum livir í egnum mátti? Eitt sinni, sum hugsar fyri teg? Eina rødd, sum talar fyri teg? Ein mátt, sum allatíðina roynir at toga teg niður?

Einki førir teg meiri til sigurs enn at biðja eftir Guds vilja og orði, tí Gud sigur, at Hann vil vaka yvir Orðinum, soleiðis at tað verður útint. Byrja tí hvønn dag við bønini:

Tú hevur sagt: "Kallar hann á meg, eg honum svari, í neyðum eg hjá honum eri. Eg hann frelsi og veiti honum æru" (Sálmi 91,15).

Tú hevur sagt: "Tí at lóg lívsins anda hevur í Kristi Jesusi gjørt meg frían frá lóg syndarinnar og deyðans" (Rómverjabrævið 8,2)

Tú hevur sagt: "Verið tí Guði undirgivnir! Men standið ímót djevulinum, og tá skal hann flýggja frá tykkum" (Jákupsbrævið 4,7)

Tú hevur sagt: "Við tað at vit bróta niður hugborgir og eitt og hvørt háløti, sum reisir seg ímót kunnleikanum um Guð, og hertaka eins og hvørja hugsan til lýdni ímót Kristi" (2. Korint. 10,5)

Tú hevur sagt: "At tit við teimum skulu verða felagar í guddómligari náttúru, tá ið tit komast undan spillingini í heiminum, sum stendst av girndum" (2. Pætursbr. 1,4)

Tú hevur sagt: "Tess vegna er tað, at eg boyggi knæ míni fyri faðirinum" (Efesusbr. 3,14)

So kanst tú takka Gudi fyri, at hann vil hjálpa tær at sleppa av við henda óvanan.

kelda: ubc.dk

# Bøn er eitt privatmál

**Fyri danska rapparan "Jokeren" er trúgvin og bønin ein natúrligur partur av gerandisdegnum**



*- Tá eg biði um fyrigeving, verði betri førur fyri at fyrigeva mær sjálvum og øðrum, sigur Jesper Dahl, betri kendur sum »Jokeren«*

- Eg haldi, at bøn er eitt privatmál millum Gud og tann einstaka. Og hetta er eitt av tí, sum tiltalar meg við protestantismuni, sigur Jesper Dahl, men sum helst er betri kendur undir heitinum »Jokeren«.

Sjálvur dylur hann ikki fyri, at hann biður dagliga.

- Eg hevði ongatíð viljað tosa alment um mína trúgv, um tað ikki var tí at eg ofta verði spurdur um tað í miðlunum.

- Men tá eg geri tað, haldi eg at tað er best at vera erligur og sannur, sigur hann við kristendom.dk.

## Undurfulli heimur

Sjálvur er hann ikki fyri at noyða onnur at halda tað sama sum hann.

Hinvegin er hann av teirri sannføring, at heimurin í góðum og ringum er eitt so ótrúligt og undurfult stað at búgva í, at hann finnur ongan møguleika í at vera fríteinkjari.

- Eg biði bønina Faðirvár, sum Jesus í Bíbliuni heitir á okkum um at gera. Onkutíð biði eg meiri frítt um annaðhvørt fyrigeving fyri syndir mínar, ella eg snøgt sagt takki Gudi fyri alt tað góða í mínum lívi.

- Eg biði eisini fyri mínum næstringum og fyri mannaættini í síni heild, sigur ein opinskáraður Jokeren.

Og hann heldur fram:

- Eg upplivi, at eg, við at biðja um fyrigeving, verði betri førur fyri at fyrigeva mær sjálvum og øðrum. Tað er ógvuliga fríandi ikki at skula bera uppá vreiði, hatur ella sjálvshatur.

Jokeren er tí av teirri sannføring, at øll menniskju er fødd við einum sprituellum eginleika.

- Eg trúgvi, at Gud er kærleiksfullur, og at hann elskar síni børn og sín skapning, endar kendi rapparin samrøðuna.

## Dýri biðidagur

Fjórði fríggjadagur eftir páskir. Hann hevur ongan beinleiðis bíbilskan ella kirkjuligan uppruna. Hann var ásettur við kongligari fyriskipan 27. mars 1686, og skuldi koma ístaðin fyri eitt ótal av biðidøgum, sum eingin fekk skil á.

Dagurin var strangliga hildin, og gamalt var, at frá vestri (kl. 6) dýrabiðidagsaftan til vestur dýra biðidag mátti ikki rúka í nøkrum húsi. Tey gomlu fastaðu eisini hetta samdøgrið. Í Suðuroy verður dagurin róptur »heiligfríggjadagur«

# Grønur sunnudagur í mai

**Trinitatis sunnudagur – 18. mai - verður í kirkjum og kristnum samkomum í ár hildin sum ein grønur dagur. - At tann grøna hugsanin kemur inn um kirkjugátt og í gudshús, er ikki eitt nýtt fyribrigdi, verður sagt av bispakontórinum**

Hugskotið at hava ein slíkan grønan sunnudag eigur Finnbogi Joensen úr Vestmanna. Finnbogi er væl kendur millum fólk, ið geva umhvørvinum gætur.

Slíkir dagar eru kendir frá grannalondum okkara, og her á landi er hetta komið beinleiðis og óbeinleiðis til sjóndar í sálmum, prædikum og lívsmynstri føroyinga.

Trinitatis sunnudagur hóskar væl sum grønur sunnudagur. Tað er vár, og summarið er í hondum.

- Eisini gudfrøðiliga er dagurin hóskandi. Vit kunnu altíð meta um, hvørt hetta er tann besti dagurin ella ikki. Havandi í huga tann várliga dámin, veðurlag og árstíð, so er valið av degnum heppið, verður sagt.

## Nøgdsemi

Í kirkjuni finst ein hópur av liturgiskum litum, har hvør litur heldur sína prædiku.

Longu fyrsta sunnudag eftir trinitatis er tann liturgiski liturin grønur.

- Hetta hóskar væl, tí nú boðar liturin frá, at tann reinsaða greinin í dópin, tann í Kristi gróðursetti, fær náðir at vaksa, trívast og loksins bera búna frukt.

- Trinitatis sunnudag hoyra vit um, at gudsótti saman við nøgdsemi er mikil vinningur. Tað er ikki altíð rætt, at alt tað, ið er meira enn dagligt breyð, skapar eydnu og gleði, verður sagt av bispakontórinum.

Og lagt verður aftrat:

- Tað er vist og satt, at sálini tørvar meira enn góðs og fæ, at ríkur er hvør tann, ið er ríkur í Guði, og at vit hava medábyrgd av jørðini. Vit mega geva børnum og eftirkomarum okkara eitt gott lív á eini reinari jørð, ið samljóðar við eitt reint hav í kveikjandi sólskipan.

Og ríkari verður lívið, tá hin hvíti liturin skapar grøna hugsan, og vit geva lívinum ein møguleika.

## Ymisk fólk hittast

**Zarepta**: Hetta vikuskiftið verður ein serliga lega fyri tey, ið bera brek og familjum teirra í Vatnsoyrum. Á leguni eru ítriv, pallborð, virksemi, tónleikur, sangur, andakt og mangt annað á skránni. Fleiri áhugaverdir fyrilestrar eru á skránni í Zarepta hesar dagarnar, millum annað um hvussu tað er at fáa eina diagnosu, hvussu tað er at vera omma hjá brekaðum barni og hvussu gerandisdagurin hjá autistum sær út.

## TeenStreet til allan heimin

**Týskland**: Aftur í ár verður høvið hjá føroyskum ungdómi at sleppa á stóru ungdómsleguna TeenStreet, sum verður hildin í døgunum 2. til 9. august í býnum Oldenburg. Føroyingar luttóku fyrstu ferð á hesi leguni í 1999, og vóru bert 15 við í ferðalagnum tað árið. Árið eftir hækkaði talið munandi, og seinast vóru ikki færri enn 130 føroyingar við. TeenStreet er ein altjóða lega fyri trúgvandi tannáringar, sum ynskja at vaksa í sínum vinalagi við Jesus, og at avspegla hetta vinalag í gerandisdegnum.

TeenStreet

## Jóhannes á kinesiskum

**Bíbliur**: Altjóða felagsskapurin "Open Doors" hevur í felag við aðrar felagsskapir staðið fyri prentingini av einum nýggjum og størri upplagi av Jóhannes-evangeli'inum á kinesiskum. Umframt hetta fer eisini ein útgáva við vitnisburðum frá trúgvandi ungdómi at fylgja við. Útgávan verður nýtt út undir Olympisku Leikunum í Kina í summar og vendir sær serliga til tey ungu.

## Evniskvøld um bøn og fyrigeving

**Leirvík**: Henda mánaðin fer missiónshúsið í bygdini (myndin) at skipa fyri íalt trimum kvøldum, har avís evni verða tikin til viðgerðar. Fyrsta tiltakið var mikukvøldið og snúði seg um bøn. Næstu ferð verður mikudagin, tá Andreas Andreasen fer at tosa um fyrigeving og seinasta kvøldið á hesum sinni verður 30. apríl, tá Alfred Olsen tosar um ymiskleika og samsvar millum evangeli'ini. Øll møtini byrja kl. 19:30.